# Nólsoy skal kannast

**Eg havi sæð hasa tekningina, og eg havi biðið Landsverk um at gera sínar metingar um, hvørt ein slík ætlan ber til, sigur Bjarni Djurholm, landsstýrismaður í Vinnumálum**




*Bjarni Djurholm heldur, at uppskotið um floghavn í Nólsoy er áhugavert, og hevur biðið Landsverk gjørt metingar, um tað ber til at leggja floghavn har úti. Eisini skal Svínoyggin kannast í so máta*

FLOGVØLLUR

*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*

- Hetta er eitt áhugavert íkast til kjakið um ein alternativan flogvøll, og tí skal tað sjálvandi kannast, um tað yvirhøvur ber til, sigur Bjarni Djurholm, landsstýrismaður.

Hann hevði framman undan greinini í Sosialinum í gjár fingið eitt avrit av skitsutekningini hjá Magnusi Hansen, og hevði beint hesa víðari til Landsverk.

- Tað er ein altjóða felagsskapur, ICAO, sum ásetur ávís virðir, tú skal halda teg innan fyri. Eru førir, har tú ikki ert innan fyri hesi virðir, so verður beinanvegin talan um undantøk, og tað ger straks málið truplari. Serliga tá tað kemur til geologisk viðurskifti er rættiliga skjótt at finna út av, antin eitt pláss er egnað til flogvøll ella ikki, sigur Bjarni Djurholm.

Nú er hetta málið so mikið nýtt, at ilt er at siga, hvussu drúgva tíð Landsverk skal hava fyri at gera sær sínar fyribils metingar. Landsstýrismaðurin roknar við, at LV má út um landoddarnar at heinta sær serfrøði í málinum, men sum nevnt kann rættiliga skjótt metast um, hvørt Nólsoy yvirhøvur kann koma upp á tal.

Her kann leggjast aftrat, at regluligar vindmátingar hava verið framdar á Borðuni í eini hundrað ár, so hagtalsgrundarlagið í tí sambandi er gott. Talan er um bæði vind, ætt og sýni.

### Tunnil fyritreyt

Ein onnur fyritreyt, sum víst verður á í uppskotinum hjá Magnusi Hansen og sum Heðin Mortensen eisini nevndi, er undirsjóvartunnil út til Nólsoyar.

Hetta vísti Bjarni Djurholm eisini á sum eina avgjørda fyritreyt av eyðsýndum orsøkum.

- Nú skal eg ikki gera meg so klókan upp á hetta, men landnyrðingsvøllurin sær fyri mær út til at vera hin meiri realistiski. Men í hvussu er so meti eg tað verða rætt og rímiligt, at kanna hendan møguleikan eisini, nú hann er nevndur, sigur Bjarni Djurholm.

At so ein møguligur flogvøllur á Borðuni ikki bara gevur íkast til flogvallarkjakið, men eisini setur hol á spurningin um undirsjóvartunnil út í oynna, er ein onnur søga.

Hvussu alt so er, hevur landsstýrismaðurin biðið Landsverk gjørt fyribils metingar, um tað ber til at gera flogvøll úti á Borðuni, og í sama viðfangi hevur hann eisini biðið um, at kanningar verða gjørdar av Svínoynni í hesum sambandi, tí eisini hon hevur verið frammi í kjakinum um alternativan flogvøll í Føroyum.

# Dýpa innsiglingina

**Bjarni Djurholm hevur biðið Fíggjarnevndina um eina millión krónur av kanna dýpið í innsiglingini í Nólsoy**

FARLEIÐ

*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin*

Á eykafíggjarlógini fyri september hevur landsstýrismaðurin í samferðslumálum, Bjarni Djurholm, biðið fíggjarnevndina um eina millión krónur til at gera kanningar at dýpdini í innsiglingini í Nólsoy fyri.

Havnin er fyri stuttum útbygd, og verandi grótkast longt. Hartil er gjørt nýtt grótkast á norðursíðuni út frá Kirkjutanganum. Men trupulleikar hava verið við dýpdini í innsiglingini, og tað er komið fyri, at skip hava tikið í botn á veg inn í havnina.

Tørvur er tí á at gera neyvari kanningar av innsiglingini til havnina fyri at tryggja, at innsiglingin er nóg djúp til verandi skipaferðslu, og hvat krevst fyri, at størri skip eisini kunnu koma inn í havnina.

Hartil kemur, at nýtt skip verður prosjekterað til Nólsoyarrutuna í næstum, og hetta verður væl størri enn verandi Ritan.

Tí verður biðið um eina eykajáttan upp á eina millión krónur at kanna og møguliga dýpa innsiglingina til havnina í Nólsoy.



*Bkarni Djurholm biðir fíggjarnevnidina um 1 mió. krónur í eyðkajáttan at kanna dýpið í innsiglingini í Nólsoy*